## Fyrireikandi verkætlan

# Eco-labelling av føroyskum fiskavørum

**Ábyrgdarhavari:**

Jógvan Martin Ferjá Joensen
martin@joensen.org

**Fíggjað hevur:**

- Grunnurin 'Fiskivinnuroyndir'
- Oljubólkurin 'The Faroes Partnership'

**August 2004**

# Innihaldsyvirlit


**1 Inngangur ....................................................................................... 3**
1.1 Kanningarháttur ....................................................................................... 3
1.2 Endamál ....................................................................................... 4
1.3 Allýsing ....................................................................................... 4
**2 Góðkenningarstovnar og merkir ....................................................................................... 7**
2.1 IFOAM ....................................................................................... 7
2.2 MSC ....................................................................................... 8
2.3 Norðurlandaráðið ....................................................................................... 9
2.4 KRAV ....................................................................................... 9
**3 Marknaðarútlit ....................................................................................... 9**
3.1 Tørvur á merking ....................................................................................... 10
3.2 Marknaðarsyklus ....................................................................................... 11
3.3 Keypsorsakir ....................................................................................... 12
3.4 Vistfrøðiligir brúkaramarknaðir ....................................................................................... 15
3.5 Síðsta søluliðið ....................................................................................... 16
3.6 Kappingarfyrimunir ....................................................................................... 18
**4 Møguleikar í Føroyum ....................................................................................... 19**
4.1 Egnað fiskasløg ....................................................................................... 19
4.2 Áhugi í vinnuni ....................................................................................... 19
**5 Tilmæli ....................................................................................... 20**
5.1 Stuðla vistfrøðiligari merking ....................................................................................... 20
5.2 Menna burðardygt merki ....................................................................................... 20
5.3 Seta umhvørvismerking í verk ....................................................................................... 20
**6 Notur ....................................................................................... 21**

# 1 Inngangur

Henda frágreiðing hevur til endamáls í stuttum at greiða frá møguleikunum fyri at føroyskar fiskavørur kunnu fáa vistfrøðiliga, burðardygga ella umhvørvisliga góðkenning. Tað er bert talan um veiddan fisk og ikki alifisk. Verkætlanin er fíggjað av grunninum 'Fiskivinnuroyndir' og oljubólkinum 'The Faroes Partnership' umboðað av Amerada Hess (Faroes) Ltd. og hetta skulu teir hava stóra tøkk fyri!

Føroyar hava ongan fullfíggjaðan umhvørvispolitikk ella politikk um burðardygga menning, men umhvørvisøkið er partur av ymsum lógum, kunngerðum og altjóða sáttmálum og fellur undir ymisk stýri. Eitt uppkast til føroyska ætlan um burðardygga menning[1] er tøkt og ætlanir hava verið frammi um at opna eina umhvørvisskrivstovu, hvørs endamál skal vera at seta Agenda 21[2] í verk í Føroyum.

Í september 2002 var ein ST toppfundur í Johannesburg um burðardygga menning.[3] Har var ein ætlan samtykt um at seta tiltøk í verk fyri at menna burðardyggan fiskiskap í heimsins høvum.[4] Í yvirlýsing frá norðurlandaráðstevnuni í Hetlandi í oktober 2003 hava Føroyar eisini samtykt hesa ætlan. Henda ætlan inniber millum annað, at tryggja at allir fiskastovnar hava nátt einum burðardyggum støði innan 2015.[5]

Sambært FAO eru 28 % av heimsins fiskastovnum annaðhvørt ovurfiskaðir ella niðurfiskaðir og onnur 47 % verða fiskaðir við fullum veiðutrýsti.[6] T.v.s., at 75 % av heimsins fiskastovnum eru undir annaðhvørt stórum ella ov stórum trýsti. Samstundis sum at tilfeingið í havinum er undir stórum trýsti, er eftirspurningurin eftir fiskavørum støðugt vaksandi. Miðalnýtslan av fiski í heiminum er nú 16 kg um árið (livandi vekt) og henda nýtslan væntast at økja til 19-21 kg í 2030.[7] Harumframt verður alsamt størri dentur lagdur á burðardygd og støðugt fleiri brúkarar vilja keypa vistfrøðiligar ella umhvørvisvinarligar matvørum. Men tá ið talan er um fiskavørur, hevur brúkarin trupult við at fáa henda tørv nøktaðan, tí enn er útboðið av vistfrøðiliga, burðardygt ella umhvørvisliga góðkendum fiskavørum sera lítið. Tí verður mett at vera talan um ein týðandi vinnumøguleika, ið er verdur at kanna nærri.

## 1.1 Kanningarháttur

Mannagongdin hevur verið ein blanding av 'desk research' og 'field research'. Stórur dentur hevur verið lagdur á at finna og lesa frágreiðingar, sum aðrir hava gjørt, áðrenn farið hevur verið undir at gera egnar kanningar. Tær flestu av hesum frágreiðingum eru skrivaðar av kanningarstovnum og universitetum. Ein onnur góð kelda hevur verið tey regluligu tíðindaskrivini sum eru komin við telduposti frá:

www.organicTS.com www.intrafish.com www.ota.com www.fvm.dk www.just-food.com

Viðvíkjandi 'field research' hevur verið luttikið á ymsum ráðstevnum, bæði í Føroyum og uttanlands. Møguleikin at luttaka á útlendskum ráðstevnum hevur verið góður, tí at umframt hesa verkætlan hevur verið arbeitt við eini verkætlan um vistfrøðiliga fiskaaling. Hetta hevur gjørt fíggjarligu byrðuna munandi léttari. Tær týdningarmestu ráðstevnurnar uttanlands vóru:

| BioFach America | BioFach Japan | BioFach Germany |
|---|---|---|
| 4. - 7. september 2003 | 9. - 11. oktober 2003 | 19. - 22. februar 2004 |

BioFach ráðstevnurnar/messurnar eru sera týdningarmiklar viðvíkjandi vistfrøðiligum matvørum. Dagarnar áðrenn og aftaná ráðstevnurnar varð høvi eisini nýtt at fundast við og vitja lokalar fiskainnflytarar, vistfrøðiligar felagsskapir og vistfrøðiligar handlar. Í Føroyum varð m.a. luttikið á ráðstevnum:

| Bitstova um sporføri í fiskivinnuni | Norðurlendsk ráðstevna um skeljar og skeljadjór |
|---|---|
| 28. oktober 2003 | 21. - 23. november 2003 |

Umframt ráðstevnuluttøku hava eisini nógvar samrøður verið við fólk í fiskivinnuni og fólk í vistfrøðiligu matvøruvinnuni. Tær mest umráðandi samrøðurnar við útlendskar stovnar hava verið við IFOAM (International Federation of Organic Agriculture Movements), MSC (Marine Stewardship Council) eins og aðrar vistfrøðiligar góðkenningarstovnar. Í Føroyum hevur verið tosað við ymsar stovnar og virkir.

## 1.2 Endamál

Endamálið við hesi fyrireikandi verkætlan er at staðfesta um grundarlag er fyri at føroyskar fiskavørur kunnu fáa eitt altjóða viðurkent merki (stempul) við tí fyri eyga at fáa hægri prís og javnari príslegu fyri fiskin, umframt at menna burðardygga fiskiskapin undir Føroyum. Eitt merki ella stempul á einari vøru gevur brúkaranum møguleika at skyna á, hvørjar vørur eru vistfrøðiligar, burðardyggar ella umhvørvisvinarligar, so hann kann velja hesa vøru fram um aðrar vørur. Stemplið, ið talan kann vera um, er eitt vistfrøðiligt merki (organic label), eitt burðardygt merki (sustainable label) ella eitt umhvørvismerki (eco-label). Fyri at grundarlagið skal vera til staðar fyri at seta merking av fiskavørum í verk er neyðugt at:

1. Eitt egnað merkið finst
2. Marknaður er fyri merktu fiskavørunum
3. Møguleikar og áhugi er í føroysku fiskivinnuni

Hesar fortreytir verða viðgjørdar í trimum pørtum í frágreiðingini, og at enda verður eitt tilmæli gjørt. Men áðrenn hetta er neyðugt at allýsa nær ein fiskavøra er vistfrøðilig, burðardygg ella umhvørvisvinarlig.

## 1.3 Allýsing

Hugtøkini 'vistfrøðiligt', 'burðardygt' og 'umhvørvisvinarligt' eru lutfalsliga nýggj, og finnast tað tískil ymsar og ofta ófullfíggjaðar allýsingar. Niðanfyri er ein roynd gjørd at allýsa hesi hugtøk, tá ið talan er um fiskavørur.

**Vistfrøðiligar fiskavørur**

Vistfrøði sum heild er væl allýst í ymsum altjóða standardum og lóggávum, men tá ið talan er um fiskavørur, er støðan nakað øðrvísi, tí vistfrøði hevur serliga verið nýtt fyri landbúnaðarvørur og ikki fyri fiskavørur. Grundprinsippini í vistfrøðiligari matframleiðslu (íroknað fiskavørur) eru at:

- **Maturin er so tryggur sum gjørligt.** Tað er tí bannað at nýta manngjørd kunstevni (litevni o.a.), antibiotika, GMO (Gen Manipuleraðar Organismur), vakstrarhormon, geislaviðgerð o.s.fr. í framleiðsluni. Í mongum førum mangla vísindalig prógv fyri skaðiligum árinum, tí tey ikki eru tøk, fyrr enn evnini hava verið nýtt í nógv ár. T.v.s., at reglurnar ofta eru grundaðar á fyrivarni heldur enn vísindalig prógv, soleiðis at trot á haldgóðum vísindaligum prógvum ikki kann nýtast sum grundgeving fyri at lækka um krøvini.

- **Framleiðslan hevur so lítið skaðiligt árin á umhvørvið sum gjørligt.** Hetta inniber m.a. skynsama nýtslu av rávørum og so lítla dálking sum gjørlig.

- **Hædd skal verða tikin fyri sosialum viðurskiftum hjá fólki.** Hetta er serliga viðkomandi fyri arbeiðsfólkið og verður gjørt við at tryggja rímiliga úrtøku og góðar arbeiðsumstøður.

- **Hædd skal verða tikin fyri djóravælferð**, soleiðis at djórið ikki líður, og at natúrligu tørvirnir hjá djórum verða nøktaðir. Her er m.a. talan um drápshættir, pláss og rørslumøguleikar.

Fyri at tryggja at grundprinsippini eru uppfylt, eru vistfrøðiligir standardar og óheftir altjóða viðurkendir góðkenningarstovnar, ið hava eftirlit við allari framleiðsluni. Um framleiðslan fylgir tí vistfrøðiliga standardinum, veitir góðkenningarstovnurin eitt vistfrøðiligt stempul, sum verður sett á vøruna. Sambært altjóða vistfrøðiligum standardum hevur orðið 'vistfrøðiligt' bert verið nýtt fyri alifisk og í ávísum førum fyri staðbundin fiskasløg/skeljadjór. Altjóða orðaskiftið um serstaka reglugerð fyri vistfrøðiligar fiskavørur fer fram í hesum døgum.

**Burðardyggar fiskavørur**

Burðardyggar fiskavørur eru vørur, ið eru veiddar og framleiddar í tráð við hugtakið 'burðardygg menning', tí verður tikið saman um og allýst, hvat burðardygg menning merkir. Í Brundtland frágreiðingini 'Our Common Future' frá 1987 verður burðardygg menning lýst sum:

> *"...en udvikling, som opfylder de nuværende generationers behov uden at bringe fremtidige generationers mulighed for at opfylde deres behov i fare."*

Henda allýsing er generel og hevur verið nógv nýtt. Í Rio yvirlýsingini um umhvørvi og menning frá 1992[8] verður menniskjað sett í sentrum og skal hava rætt til eitt sunt og virkið lív í samljóð við náttúruna. Tað fyrsta av teimum 27 prinsippunum í yvirlýsingini sigur:

> *"Human beings are at the centre of concerns for sustainable development. They are entitled to a healthy and productive life in harmony with nature."*

Norðurlond eru sera frammarlaga, tá ið talan er um hugtakið burðardygga menning. Í hesum sambandi skal nevnast, at Norðurlandaráðið býtir hugtakið 'burðardygg menning' upp í tríggjar partar:

- Sosial viðurskifti
- Búskap
- Umhvørvi

Hugsanin er at náa hægsta støðið í sosialari og búskaparligari vælferð uttan at hava skaðilig árin á umhvørvið. Harvið verður tryggjað, at komandi ættarlið fáa møguleika at njóta ta somu sosialu og búskaparligu vælferð sum núverandi ættarlið.

Tá ið tikið verður samanum allýsingarnar frá Brundtland, Rio og Norðurlandaráðnum kunnu fýra hornasteinar í burðardyggari menning eyðmerkjast.

| **Sosial viðurskifti** | **Matvørutrygd (food safety)** |
|---|---|
| • Rímilig úrtøka hjá arbeiðsfólki<br>• Góður trivnaður hjá arbeiðsfólki | • Eingi heilsuskaðilig evni í vøruni, grundað á fyrivarni um eingi vísindalig prógv finnast. |
| **Búskapur** | **Umhvørvi** |
| • Lønandi vinna<br>• Nøktandi íløgur verða gjørdar | • Skynsom nýtsla av náttúruríkidøminum<br>• So lítil dálking sum gjørligt |

Fyri at ein fiskavøra kann verða kallað burðardygg, skal hon uppfylla allar omanfyrinevndu treytir í allari framleiðslurøðini.

**Umhvørvisvinarligar fiskavørur**
Í samband við fiskavørur merkir hugtakið 'umhvørvisvinarligt' at fyribyrgja, at fiskastovnar verða niðurfiskaðir og at fiskiskapurin ikki hevur skaðilig árin á vistskipanina (ecosystem). Lyklaorð í hesum sambandi eru fyriskipan, veiðihættir, hjáveiða og dálking. Í ávísum førum kann hugtakið 'umhvørvisvinarligt' nýtast sjálvt um troytti fiskastovnurin er illa fyri. Treytin er, at fiskiskapurin verður soleiðis fyriskipaður, at stovnurin kann mennast aftur.

Umhvørvisvinarligar fiskavørur umfata eitt munandi minni øki enn bæði vistfrøðiligar og burðardyggar fiskavørur. Hetta kemst av, at talan bert er um umhvørvi og ikki matvørutrygd, sosial viðurskifti, djóravælferð og búskap. Harumframt umfatar umhvørvismerking av fiskavørum bert tann partin av framleiðslurøðini, sum fer fram, inntil fiskurin verður landaður.

# 2 Góðkenningarstovnar og merkir

Hóskandi góðkenningarstovnur og merki er sum nevnt ein týðandi fortreyt fyri, at henda verkætlan kann halda fram, tí verður ein lýsing gjørd av góðkenningarstovnum og merkjum, ið kunnu vera hóskandi fyri føroyskar fiskavørur.

## 2.1 IFOAM

www.ifoam.org

IFOAM (International Federation of Organic Agriculture Movements) er altjóða sameinandi felagsskapur (umbrella organisation) fyri vistfrøðiligari menning og varð stovnaður í 1972. Nú eru 730 felagsskapir úr 100 londum limir í IFOAM. Ein av hornasteinunum í IFOAM er altjóða standardurin fyri vistfrøðiliga framleiðslu, sum er grundarlagið fyri øðrum vistfrøðiligum standardum í øllum heiminum.[9] Standardurin snýr seg serliga um landbúnaðarvørur, men fevnir eisini um vill djór og plantur, herímillum tilfeingið í havinum.

Ein treyt fyri vistfrøðiligari góðkenning av tilfeingi úr havinum er, at talan er um staðbundin fiskasløg/skeljadjór. Hvat 'staðbundin' merkir er ikki nærri allýst, men higartil hava bert skeljadjór fingið vistfrøðiliga merkið. Eftir at hava tosað við IFOAM, er ikki óhugsandi at ávís staðbundin fiskasløg kunnu fáa vistfrøðiliga merkið, um haldgóð prógv eru fyri, at fiskurin veruliga er staðbundin.

IFOAM hevur ikki beinleiðis eftirlit við nakrari framleiðslu ella veiðu, tí IFOAM standardurin er ein standardur fyri aðrar standardar. T.v.s., at tað eru aðrir góðkenningarstovnar, ið eru limir í IFOAM, sum gera góðkenningar- og eftirlitsarbeiðið og veita vistfrøðiliga merkið. Tað eru sera nógvir slíkir góðkenningarstovnar runt um í heiminum, men ikki allir fáast við at góðkenna veiðu, bert framleiðslu. Niðanfyri síggjast nakrir av góðkenningarstovnunum á okkara leiðum, ið kundu verið nýttir í Føroyum.

**Naturland**
www.naturland.de

**TÚN Vottunarstofan**
www.mmedia.is/tun

**Soil Association**
www.soilassociation.org

**Debio**
www.debio.no

Naturland og Soil Association eru teir mest viðurkendu góðkenningarstovnunum í ávikavist Týsklandi og Bretlandi. TÚN Vottunarstofan er Íslendski góðkenningarstovnurin og Debio er tann norski. Allir eru altjóða viðurkendir og limir í IFOAM.

## 2.2 MSC

www.msc.org

MSC (Marine Stewardship Council) er tann stovnurin, ið er komin longst viðvíkjandi eco-labelling (umhvørvismerking) av veiddum fiski.[10] MSC varð stovnað í 1997 av WWF (World Wildlife Fund) og Unilever við tí fyri eyga at menna burðardyggan fiskiskap og harvið tryggja varandi gagnnýtslu av tilfeinginum í havinum. Orsakað av tilknýtinum til WWF og Unilever hevur spurnartekin verið sett við sjálvræðið hjá MSC, men síðan 1999 hevur stovnurin verið óheftur av WWF og Unilever. Á vári 2004 vóru aftur atfinningar frammi um, at MSC-stovnurin ikki var heilt óheftur, og at mannagongdirnar fyri góðkenningini ikki vóru nóg gjøgnumskygdar og einsháttaðar.[11] Hóast mótburð er MSC sum nevnt tann stovnurin, ið er komin longst viðvíkjandi eco-labelling av veiddum fiski.

Ein fiskiskapur, ið skal umhvørvismerkjast, verður mettur eftir MSC standardinum, men sjálvt metingararbeiðið verður framt av óheftum serfrøðingum ella stovnum, sum MSC hevur góðkent. Sjálvt merkið verður sett á liðugtframleiddu vøruna, men tað er bert fiskiskapurin, ið verður góðkendur. T.v.s., tann partin av framleiðslurøðini sum fer fram, inntil fiskurin verður landaður.

Í standardinum eru 3 grundprinsipp, ið verða nýtt til at meta um, hvussu burðardyggur ella umhvørvisvinarligur ein fiskiskapur er.[12] Hesi prinsipp snúgv seg í stuttum um at:

1. Fyribyrgja ovurfisking og niðurfisking av fiskastovnum, og um ein stovnur er ovurfiskaður, skal fiskast soleiðis, at stovnurin mennist aftur.
2. Fiskiskapurin ikki hevur skaðilig árin á vistskipanina, herímillum avmarking av hjáveiðu.
3. Fiskiskapurin er væl fyriskipaður, soleiðis at umhvørvisvinarligur fiskiskapur kann verða framdur í verki.

Tað verður eisini nevnt í standardinum, at hann umfatar menniskjaligar og sosialar síður av fiskiskapinum, men lítið ítøkiligt er um hetta.

Mannagongdin fyri metingararbeiðið er tann, at ein sokallað 'pre-assessment' verður gjørd (kostar uml. 30.000-50.000 kr.) fyri at fáa eina ábending um, hvørt fiskiskapurin kann væntast at blíva góðkendur, tá ið ein fullfíggjað meting verður framd seinni.[13] Tann fullfíggjaða metingin kann taka frá minni enn einum ári til meiri enn tvey ár, treytað av hvussu stórur og torgreiddur fiskiskapurin er. Um góðkenning fæst, verður hon galdandi í 5 ár við einum árligum ófráboðaðum eftirliti.

Higartil eru 7 fiskiskapir MSC-góðkendir og 13 aðrir eru á veg. Serliga hevur verið talan um smáar og avmarkaðar fiskiskapir, men tann fyrsti størri fiskiskapurin fekk MSC-stemplið í 2003.[14] Tosað hevur verið við MSC og teir eru sera áhugaðir í at samarbeiða við føroyingar um umhvørvismerking av føroyskum fiskiskapi.

## 2.3 Norðurlandaráðið

www.norden.org

Norðurlandaráðið hevur samtykt eina ætlan um burðardygga menning í Norðurlondum. Henda ætlan kom í gildi 1. januar 2001 og hevur stevnumið fram til 2020. Longu í 1997 byrjaði Norðurlandaráðið at gera ein standard fyri umhvørvismerking av fiskavørum. Eitt uppskot til innihaldið í standardinum varð gjørt, men arbeiðið bleiv útsett inntil ES tók støðu til umhvørvismerking av fiskavørum. Málið hevur síðan verið frammi á fleiri ES ráðharrafundum, og ES hevur givið til kennar, at umhvørvismerking av fiskavørum er neyðug.

Prinsippini í standardinum eru lík teimum í MSC-standardinum, góð fyriskipan av fiskiskapinum, stovnsrøkt og verja av vistskipanina.[15] Enn er eingin fiskiskapur umhvørvisgóðkendur, og tað er óvist, hvørjar ætlanir Norðurlandaráðið hevur hesum viðvíkjandi.

## 2.4 KRAV

www.krav.se

KRAV er svenski vistfrøðiligi góðkenningarstovnurin og er limur í IFOAM, og kann soleiðis veita vistfrøðiliga merkið sambært IFOAM standardinum. Men umframt hetta er KRAV í ferð við at gera serstakan standard fyri fiskiskap, ið væntandi verður liðugur í 2004. Bakgrundin fyri at menna ein nýggjan standard er, at KRAV metir, at MSC-standardurin hevur lítlan møguleika fyri at vinna frama í Svøríki og Noregi. Harumframt vænta teir ikki, at Norðurlandaráðið fer at koma við nøkrum standardi fyri veiddan fisk.[16] Í fyrstu syftu er ætlanin at standardurin skal brúkast til svenskan og møguliga norskan fiskiskap.

Innihaldið í KRAV-standardinum er breiðari enn í MSC-standardinum og tað sum varð mælt til í Norðurlandaráðs-standardinum. Størsti munurin er, at KRAV-standardurin fevnir um alla frameiðslurøðina av grunni at munni. T.v.s., umframt fiskastovnar (ICES tilmæli), vistskipan og fyriskipan av fiskiskapi er ætlanin, at standardurin eisini skal umfata sporføri, arbeiðsumhvørvi, úrtøku hjá arbeiðsfólki, djóravælferð og orkunýtslu.[17]

Fyrstu fiskavørurnar, sum væntast at fáa KRAV umhvørvismerkið, eru fryst toskafløk, sild í dós og feskar rækjur og krabbar. Samskift hevur verið við KRAV um møguleikarnar fyri at fá føroyskan fiskiskap umhvørvismerktan, men tað er ikki sannlíkt, at Føroyar kunnu vera við frá byrjan. Tó skal hetta ikki útihýsa møguleikunum, tá ið skipanin er komin at virka.

# 3 Marknaðarútlit

Í hesum parti verður hugt at marknaðarútlitunum fyri vistfrøðiligum, burðardyggum og umhvørvisvinarligum fiskavørum, tí sum nevnt er hetta ein týðandi fortreyt fyri, at arbeiðið kann halda fram. Fyrst verður tørvurin á merking viðgjørdur og harnæst hugt at marknaðarsyklusinum. Síðan verða keypsorsakir, vistfrøðiligir brúkaramarknaðir og síðsta søluliðið greinað. At enda verður tikið saman um kappingarfyrimunir, ið merking av fiskavørum kunnu hava við sær.

## 3.1 Tørvur á merking

Kanningar benda á, at brúkarar kenna seg hava alt ov lítið av upplýsingum um fiskavørur. Hetta kemur serliga til sjóndar, tá ið teir skulu taka støðu til, hvørjar fiskavørur eru umhvørvisvinarligar og møguliga heilsuskaðiligar. Í 2003 varð ein marknaðarkanning fyri burðardyggar fiskavørur gjørd í USA, kanningin innihelt eisini eina brúkarakanning frá 2001.[18] Niðanfyri verða nakrar av høvuðsniðurstøðunum bornar fram. Sum tað sæst, halda meiri enn tveir triðingar av brúkarunum seg hava og lítið av upplýsingum um, hvørjar fiskavørur kunnu vera heilsuskaðiligar ella hava skaðilig árin á havumhvørvið.

**Upplýsingar um fiskavørur (USA)**

| | ***Hava ov lítið av upplýsingum*** | ***Vilja hava meira upplýsingar*** |
|---|---|---|
| Heldur tú teg hava nóg mikið ella ov lítið av upplýsingum fyri at vera før/ur fyri at meta um, hvørjar fiskavørur kunnu vera heilsuskaðiligar fyri teg ella familjuna hjá tær? | 70 % | 83 % |
| Heldur tú teg hava nóg mikið ella ov lítið av upplýsingum fyri at vera før/ur fyri at meta um, hvørjar fiskavørur eru ovurfiskaðar ella fiskaðar á ein slíkan hátt, at tær hava skaðilig árin á annað lív í havinum ella havumhvørvið? | 76 % | 67 % |

Kelda: The Marketplace for Sustainable Seafood

Somuleiðis hava meiri enn tveir triðingar av brúkarunum áhuga í at fáa meira upplýsingar. Tað eru fleiri hættir at veita brúkaranum upplýsingar uppá, so sum vørumerking, upplýsingar í fjølmiðlunum, uppskriftir í kókibókum o.s.fr. Vísandi til kanningina í USA fáa fleiri ymsir hættir undirtøku. Størsta undirtøku fær tó vørumerking og flestu brúkarar (80-90 %) halda, at hetta er ein góð loysn uppá trupulleikarnar, ið vinnuligur fiskiskapur hevur við sær. Harumframt siga 72 %, at um vøran hevur eitt umhvørvismerki, er størri møguleiki fyri at tey keypa hana. Nógvir brúkarar siga seg longu hava tikið ávísar vørur framum aðrar grundað á heilsuviðurskifti (57 %) ella møgulig skaðilig árin á umhvørvið (37 %). Tað eru soleiðis greiðar ábendingar um, at tørvur er á at merkja fiskavørur, og at útlit eru fyri at hetta fer at geva góð úrslit.

## 3.2 Marknaðarsyklus

Ein marknaður fer vanliga ígjøgnum fýra ymisk tíðarskeið. Fyrsta tíðarskeiðið er byrjanin, og síðan kemur vøksturin, harnæst verður marknaðurin búgvin, og at enda minkar hann aftur. Eco-labelling av fiskavørum er eitt lutfalsliga nýtt fyribrigdi. Sum víst á myndini niðanfyri er marknaðurin fyri hesar vørur í byrjanartíðarskeiðinum,

**Marknaðarsyklus**




Kelda: Egin framleiðsla

Eyðkennini fyri byrjanartíðarskeiðið eru, at kundarnir eru nýskaparar, sølan er lutfalsliga lítil, kapping er lítil, kostnaðurin fyri hvønn kunda er høgur og vinningurin er negativur. Samstundis er talan um týðandi vinnumøguleikar, ið kunnu geva stórt fíggjarligt avkast og fáa alstóran týdning, tá ið marknaðurin veksur og gerst búgvin. Harumframt er tað ein fyrimunur at vera við frá byrjan, og tað er møguligt viðvíkjandi merktum fiskavørum, tí enn er marknaðurin lítið mentur. Men fyri at hetta kann gerast veruleiki, er neyðugt at gera íløgur, íløgutørvurin er ikki stórur og verður nærri viðgjørdur seinni í frágreiðingini.

Rákið í altjóða marknaðum (serliga í tí ríka partinum av heiminum) er soleiðis, at fleiri og fleiri brúkarar leggja alsamt størri dent á burðardygd. T.v.s., at greiðar ábendingar eru um at marknaðurin fer at vaksa so hvørt sum útboðið veksur. Sambært brúkarakanningum í Evropa og USA, har fleiri enn 5.000 húsarhald vóru spurd, er niðurstøðan tann, at brúkarin tekur merktar fiskavørur framum fiskavørur, ið ikki eru merktar.[19] Harumframt kom fram í kanningini, at tá ið merktar fiskavørur verða útbodnar, økist keypstíttleikin og nøgdin sum húsarhaldini keypa.

## 3.3 Keypsorsakir

Fyri at staðfesta keypsorsakirnar fyri merktar fiskavørur (vistfrøðiligar, burðardyggar ella umhvørvisvinarligar) verður fyrst hugt nærri at keypsorsakunum fyri vistfrøðiligar matvørur sum heild og síðan at keypsorsakunum fyri fiskavørur sum heild. Hetta verður gjørt, tí lítið at upplýsingum finst um keypsorsakirnar fyri merktar fiskavørur.

Á vistfrøðiliga matvørumarknaðinum er týdningarmiklasta keypsorsøkin matvørutrygd. T.v.s., at kundin keypir vistfrøðiligan mat fyri at fyribyrgja heilsutrupulleikar, sum maturin kann volda fyri seg og familjuna. Hetta er í tráð við allýsingina av vistfrøðiligari framleiðslu, tí matvørutrygd er sum nevnt fyrsta grundprinsippið. Óttin fyri at vanligur matur ikki er nóg tryggur kemst av at hildið verður, at manngjørd kunstevni, antibiotika, GMO og vakstrarhormon kunna elva til ovurviðkvæmi, krabbamein og aðrar sjúkur. Hesin ótti er ikki altíð vísindaliga skjalfestur, tí er tað ofta av fyrivarni, at fólk velja at keypa vistfrøðiligan mat. Matvørutrygd er vorðin enn týdningarmiklari eftir matvørugølurnar, eitt nú neytaøði o.a., sum hava verið. Harumframt geva kanningar ábendingar um, at vistfrøðiligur matur hevur hægri føðsluvirði enn vanligur matur.[20]

Tann næsta týðandi keypsorsøkin á vistfrøðiliga matvørumarknaðinum er náttúru- og umhvørvisvernd, sum m.a. inniber skynsama nýtslu av náttúrutilfeinginum og so lítla dálkingin sum gjørlig. Týdningurin av hesari keypsorsøk er skiftandi millum lond og serliga kemst av, í hvussu stóran mun fólk uppfata náttúru- og umhvørvisvernd sum eina persónliga ábyrgd. Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir, hvussu stórur partur av fólkinum í ymsum londum halda seg hava lítla ávirkan á umhvørvið.[21]

**Partur av fólkinum sum heldur seg hava lítla persónliga ávirkan á umhvørvið (í %)**

| Land | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|
| USA | 28 | 27 | **31** |
| Týskland | 34 | 33 | **32** |
| Frankaríki | 80 | 85 | **43** |
| Bretland | 45 | 43 | **44** |
| Spania | 32 | 51 | **44** |
| Japan | 56 | 53 | **53** |
| Meksiko | 44 | 58 | **55** |
| India | 80 | 76 | **85** |
| Russland | 87 | 93 | **91** |

Kelda: Hábitos de Consumo y Medio Ambiente en España 2001

Tað er eyðmerkt at serliga í tí ríka partinum av heiminum eru færri fólk, sum halda seg hava lítla persónliga ávirkan á umhvørvið. Henda ávirkan kann millum annað koma til sjóndar við at keypa vistfrøðiligar, burðardyggar ella umhvørvismerktar vørur.

Spegilsmyndin av keypsorsakunum eru sølugrundgevingarnar, sum handilsmenn nýta. Ein kanning hesum viðvíkjandi er gjørd í ymsum evropeiskum londum, og úrslitið er tikið samanum í talvuni niðanfyri. Niðurstøðan er líknandi, fyrst matvørutrygd og síðan náttúruvernd og aðrar sølugrundgevingar. Tó skal sigast, at flestu kundar keypa vistfrøðiligan mat grundað á meiri enn eina keypsorsøk. Ofta er talan um eina blanding av orsøkum, sum eru tengdar at heilsu, umhvørvi og øðrum viðurskiftum.

**Sølugrundgevingar hjá handilsmonnum**[22]

1 = lítlan týdning 7 = stóran týdning

| Land | Matvørutrygd | Náttúruvernd | Smakkur | Djóravælferð |
|---|---|---|---|---|
| Týskland | 6 | 4 | 5 | 4 |
| Bretland | 7 | 5 | 3 | 3 |
| Italia | 7 | 6 | 1 | 1 |
| Frankaríki | 7 | 5 | 6 | 5 |
| Sveis | 6 | 6 | 2 | 6 |
| Holland | 6 | 4 | 2 | 3 |
| Svøríki | 7 | 6 | 1 | 2 |
| Danmark | 5 | 1 | - | 4 |
| Eysturríki | 7 | 5 | 5 | 6 |
| Belgia | 7 | 7 | 7 | 6 |
| Spania | 7 | 1 | 5 | 2 |
| Grikkaland | 7 | 2 | 3 | 1 |
| | | | | |
| **Í meðal** | 6,6 | 4,3 | 3,6 | 3,6 |

Kelda: Hamm, Ulrich.

Tá ið talan er um vanligar fiskavørur, t.v.s. ikki merktar, eru keypsorsakirnar líknandi teimum fyri vistfrøðiligar matvørur. Líkheitin er at nógv størri gætur verður givin heilsuviðurskiftum enn umhvørvisárinum (dálking og ovurfisking), sum fiskiskapurin kann hava. Sambært kanningini í "The Marketplace for Sustainable Seafood" bera brúkararnir serliga ótta fyri at eta fisk sum er fiskaður í dálkaðum sjógvi. Harumframt ynsktu teir at minka ella avmarka nýtsluna av reyðum kjøti og økja nýtsluna av omega-3 fitisýrum. Brúkararnir vóru eisini bidnir um at siga, hvussu nógv tey høvdu hoyrt um ávís viðurskifti viðvíkjandi fiski og fiskiskapi. Sum tað sæst í talvuni á næstu síðu hevði meira enn helvtin (57 %) hoyrt nógv um, at tað er gott fyri heilsuna at eta fisk samanborið við ein triðjapart (33 %) sum høvdu hoyrt nógv um skaðan, ið summir fiskiskapir kunnu hava á havumhvørvið.

**Tilvitan um sjómatarheilsu og burðardygd (USA)**

| | *Nógv* | *Nakað* | *Ikki so nógv* | *Einki* |
|---|---|---|---|---|
| Gott fyri heilsuna at eta fisk? | 57 % | 32 % | 7 % | 4 % |
| Heilsuskaði av at eta dálkaðan/ ótryggan fisk | 41 % | 37 % | 15 % | 6 % |
| Skaði gjørdur á havumhvørvið av summum fiskiskapum | 33 % | 38 % | 17 % | 11 % |
| **Spurningur:** Eg fari at nevna nøkur ting, sum tú kanska hevur hoyrt um fisk og fiskiskap. Hvørja ferð eg nevni eitt, so sig mær vinarliga, um tú hevur hoyrt nógv, nakað, ikki so nógv ella einki um hetta evnið. Um tú ivast, so sig endiliga til. | | | | |

Kelda: The Marketplace for Sustainable Seafood

Samstundis er tað eitt ósamsvar at 78 % (41 + 37) av teimum spurdu fiskabrúkarunum høvdu hoyrt nógv ella nakað um, at tað kann vera heilsuskaðiligt at eta fisk grundað á dálking. Hetta kann tolkast sum at brúkarin hevur stóran tørv á at kunna skyna á hvørjar fiskavørur eru tryggar at eta og hvørjar eru ótryggar. Spurdir beinleiðis um hvørjir lutir hava størstan týdning í fiskavørukeypinum (tabell niðanfyri) er eyðsæð at allarstørsta týdningin hava tey vanligu góðskukrøvini (lutir 1 og 2), ið verða sett til matvørur.

**Lutir í fiskavørukeypi (USA)**

| *Nr.* | *Lutur* | *Eitt tað týdningarmiklasta ella sera týdningarmikið* |
|---|---|---|
| 1 | Feskleiki og luktur | 92 % |
| 2 | Smakkur og fastleiki | 87 % |
| 3 | Møguleiki fyri at vøran er dálkað | 78 % |
| 4 | Sunt/føðsluríkt | 70 % |
| 5 | Etið vøruna áður | 55 % |
| 6 | Prísur | 53 % |
| 7 | Møguligur skaði á onnur havdjór | 47 % |
| 8 | Um fiskaslagið er ovurfiskað | 44 % |
| 9 | Møguligur skaði á havumhvørvið | 43 % |

Kelda: The Marketplace for Sustainable Seafood

Harnæst kemur heilsa (lutir 3 og 4), væl frammanfyri umhvørvi (lutir 7-9). T.v.s., at heilsu- og umhvørvistrygd eru eyka góðskueginleikar, ið merktar fiskavørur kunnu veita. Tískil er ikki nokk bert at merkja vøruna og halda at hon verður keypt, vanligu góðskukrøvini skulu lúkast fyrst.

## 3.4 Vistfrøðiligir brúkaramarknaðir

Hóast talan kann verða um trý ymisk sløg av merkjum (vistfrøðiligt, burðardygt ella umhvørvisvinarligt) verður mett at vøran kann seljast á sama marknaði, tí vistfrøðiliga marknaðinum. Hetta kemst av at fiskavørur gjørdar úr veiddum fiski eru í teirri serstøðu, at rávøran er vill og ikki dyrkað ella ald. Av tí at rávøran er vill, verður tað í vistfrøðiligum matvørustandardum mett, at framleiðarin av lidnu vøruni ikki hevur nøktandi kontroll yvir rávøruni til at fáa vistfrøðiliga merkið. Tí verður burðardygga ella umhvørvisvinarliga merkið góðtikið.

Sæð frá framleiðarans síðu kann talan verða um bæði fisk til matna og ídnaðarfisk, men liðugtvøran endar á brúkaramarknaðinum. Tí verður dentur lagdur á at lýsa teir mest týðandi vistfrøðiligu brúkaramarknaðirnar í heiminum. Sum heild er mangul á hagtølum viðvíkjandi vistfrøðiligum matvørumarknaðum, tí verður talan um metingar. International Trade Centre UNCTAD/WTO metir heimsmarknaðin fyri vistfrøðiligar matvørur vera 23 – 25 mia. USD/Evrur (Tá ið metingarnar vóru gjørdar var 1 USD = 1 Evru).[23]

**Vistfrøðiligir matvørumarknaðir**

| *Marknaður* | *Detailhandil 2003 Mió. USD/Evrur* | *Væntaður árligur vøkstur 2003 – 2005* |
|---|---|---|
| **Norðuramerika** | 11.850 – 14.000 | 15 – 20 % |
| **Evropa** | 10.000 – 11.000 | 5 – 15 % |
| **Japan** | (350 – 450) | 15 – 20 % |

Kelda: The World of Organic Agriculture 2003

Sum tað sæst í talvuni omanfyri eru týdningarmestu marknaðirnir í ídnaðarlondunum. Norðuramerika umfatar bæði USA og Kanada. USA umboðar 11 – 13 mia. USD/Evrur og hevur ein væntaðan árligan vøkstur uppá 15 – 20 %, ímeðan kanadiski marknaðurin er 850 – 1.000 USD/Evrur við 10 – 20 % í væntaðum vøkstri. Evropeiski vistfrøðiligi matvørumarknaðurin er mettur til 10 – 11 mia. USD/Evrur við heldur lægri væntaðum vøkstri enn Norðuramerika og Japan.

Støddin á japanska marknaðinum er nakað misvísandi, tí í 2001 bleiv japanska reglugerðin fyri vistfrøðiligar matvørur munandi broytt. Hetta hevði við sær, at uml. 88 % av vørunum, ið higartil høvdu verið kallaðar vistfrøðiligar, ikki uppfyltu nýggju treytirnar. Tí er nú formelt talan um tveir marknaðir, tann vistfrøðiliga, 350 – 450 mió. USD/Evrur (12 %) og tað sum í Japan verður kallað ‘tann grøna marknaðin’, uml. 2.900 mió. USD/Evrur (88 %).[24] Í samband við merktar fiskavørur verður mett beinast at taka støði í tí vistfrøðiliga og grøna marknaðinum tilsamans t.v.s. uml. 3,3 mia. USD/Evrur. Hetta kemst av at tað í veruleikanum ikki er talan um 2 ymiskar marknaðir, hetta er heldur ein umsitingarlig uppbýting. Í talvuni á næst síðu er støddin á teimum ymsu vistfrøðiligu marknaðunum í Evropa víst.

**Evropeiskir vistfrøðiligir marknaðir**[25]

| *Land* | *Detailhandil 2003 (mió. USD/Evrur)* | *Partur av samlaða matvøru-marknaðinum 2003* | *Væntaður árligur vøkstur 2003 – 2005* |
|---|---|---|---|
| **Týskland** | 2.800 – 3.100 | 1,7 – 2,2 % | 5 – 10 % |
| **Bretland** | 1.550 – 1.750 | 1,5 – 2,0 % | 10 – 15 % |
| **Italia** | 1.250 – 1.400 | 1,0 – 1,5 % | 5 – 15 % |
| **Frankaríki** | 1.200 – 1.300 | 1,0 – 1,5 % | 5 – 10 % |
| **Sveis** | 725 – 775 | 3,2 – 3,7 % | 5 – 15 % |
| **Holland** | 425 – 475 | 1,0 – 1,5 % | 5 – 10 % |
| **Svøríki** | 350 – 400 | 1,5 – 2,0 % | 10 – 15 % |
| **Danmark** | 325 – 375 | 2,2 – 2,7 % | 0 – 5 % |
| **Eysturríki** | 325 – 375 | 2,0 – 2,5 % | 5 – 10 % |
| **Belgia** | 200 – 250 | 1,0 – 1,5 % | 5 – 10 % |
| **Spania**[26] | 123 – 128 | < 0,2 % | 15 – 20 % |
| **Írland** | 40 – 50 | < 0,5 % | 10 – 20 % |
| **Onnur lond** | 625 – 725 | – | – |

Kelda: Overview World Markets for Organic Food & Beverages (forecast)

Týskland er nógv tann største marknaðurin í Evropa við uml. 3 mia. Evrum, men . Lutfalsligu størstu marknaðirnir eru Sveis og Danmark við 2,5 – 3,5 % av samlaða matvørumarknaðinum.

## 3.5 Síðsta søluliðið

Tað síðsta søluliðið er sera týdningarmikið, tí tað er her, brúkarin keypir vøruna. Talan er um tveir høvuðsbólkar:

1. Matvøruhandlar (detailhandil)
2. Matstovur og stovnar (catering)

Innan hesi øki mangla fullfíggjað hagtøl, serliga viðvíkjandi vistfrøði í Japan og Norðuramerika. Hóast hetta vera upplýsingar bornar fram, ið geva eina vegleiðandi mynd. Í Evropa hava supermarknaðirnir sum heild størsta marknaðarpartin, mált í prosent av samlaða umsetninginum. Men sum tað sæst í tabellini á næstu síðu, hava t.d. serhandlar í Týskland 38 % av samlaða vistfrøðiliga matvøruumsetninginum, sum er meir enn supermarknaðirnir.[27]

### Vistfrøðiligur detailhandil í Evropa

| *Land* | *Supermarknaðir* | *Serhandlar* | *Beinleiðis søla* | *Aðrir* |
|---|---|---|---|---|
| **Týskland** | 33 % | 38 % | 17 % | 12 % |
| **Bretland** | 80 % | 8 % | 12 % | 0 % |
| **Italia** | 43 % | 39 % | 11 % | 7 % |
| **Frankaríki** | 42 % | 28 % | 23 % | 7 % |
| **Sveis** | 71 % | 19 % | 7 % | 3 % |
| **Holland** | 41 % | 44 % | 10 % | 5 % |
| **Svøríki** | 73 % | 0 % | 5 % | 21 % |
| **Danmark** | 86 % | 4 % | 7 % | 3 % |
| **Eysturríki** | 72 % | 8 % | 15 % | 5 % |
| **Belgia** | 50 % | 40 % | 10 % | 0 % |
| **Spania** | 10 % | 85 % | 3 % | 2 % |
| **Grikkaland** | 22 % | 40 % | 18 % | 21 % |
| | | | | |
| **Í meðal** | **52 %** | **29 %** | **12 %** | **7 %** |

Keldur: 1) Hamm, Ulrich 2) Minetti, Ana Clara 3) Joensen, Martin

Á myndin niðanfyri er rákið fyri marknaðarpartin hjá supermarknaðum víst og greitt er, at í flestu londum fáa supermarknaðirnir alsamt størri týdning.

### Vistfrøðiligur marknaðarpartur hjá supermarknaðum




Keldur: The World of Organic Agriculture 2003 fyri 1997/98 og Hamm, Ulrich. fyri ár 2000.

Í Danmark og Svøríki er rákið ikki tað sama sum í hinum Evropeisku londum. Hetta kemst av at í Danmark og Svøríki vóru supermarknaðirnir teir fyrstu at selja vistfrøðiligar matvørur í 1980-unum. T.v.s., at teir frá byrjan hava havt nærum 100 % av marknaðinum.

**Catering**
Vistaveitingar (catering) til matstovur og stovnar umboða vanliga ein týðandi part av samlaða marknaðinum. Í USA til dømis, verður 1/3 av fiskanøgdunum etin uttan fyri heimið og svarar hetta til 2/3 av virðinum ella 38 mia. USD árliga. Tað er soleiðis at tey dýraru fiskasløgini verða vanliga etin á matstovum. Tá ið talan er um vistfrøðiliga matvørumarknaðin umboða matstovur og stovnar ein sera lítlan part, men tess størri verða menningarmøguleikarnir mettir at vera. Ábendingar eru um at vøksturin er stórur í nógvum londum. Í Italia til dømis hava 2/3 av kantinunum í skúlunum onkran vistfrøðiligan mat, hóast bert 3 % hava heilar vistfrøðiligar rættir.[28] Vøkstur er eisini at finna í Bretlandi, serliga inna skúlaverkið.[29] Í Noregi og Svøríki er vøkstur innan heilsuverkið, eisini kann nevnast at Scandic hotellketan í Noregi hevur innført vistfrøðiligan mat.[30] Í Danmark metir HORESTA (Hotel-, Restaurant- & Turisterhvervet) at vistfrøðiligi marknaðarparturin í matstovum og stovnum er nærum 5 %.

Sambært kanningini í “The Marketplace for Sustainable Seafood” hava 67 % av kundunum í USA hug at eta umhvørvisvinarligan mat á matstovum. Í somu kanning varð tosað við 150 detailhandlar og við 400 køksmeistarar í matstovum, ið sum heild hava størri vitan um vøruna, og hvussu hon er framleidd. 66 % av køksmeistarunum og 37 % av detailhandlunum siga seg hava áhugi í upplýsingum um burðardyggar fiskavørur. Harumframt siga 30 % av køksmeistarunum og 20 % av detailhandlunum seg hava avgjørt ikki at selja ávísar fiskavørur av ótta fyri møguligum skaðiligum árinum á havumhvørvið.

## 3.6 Kappingarfyrimunir

Merking av fiskavørum (vistfrøðilig, burðardygg ella umhvørvisvinarlig) kann geva fleiri týðandi kappingarfyrimunir. Av tí at rákið í altjóða matvørumarknaðum er soleiðis, at alsamt fleiri brúkarar leggja størri dent á heilsuviðurskifti og umhvørvisvernd, eru góðir møguleikar fyri, at merkta vøran verður tikin framum. Longu nú hava fleiri stórar handilsketur avgjørt at keypa so nógvar umhvørvismerktar fiskavørur sum møguligt og minka um fiskavørurnar, sum ikki eru umhvørvismerktar. Dømi um hesar handilsketur eru **Sainsbury's**, ið er triðstørsta supermarknaðarketan í Bretlani. **Migros**, ið er størsta supermarknaðarketan í Sveis. **Whole Foods Markets** í USA sum hevur 140 supermarknaðir. Harumframt hevur ein av heimsins størstu fiskakeyparum ‘**Unilever**’ tikið somu avgerð um at keypa so nógvar umhvørvismerktar fiskavørur sum møguligt.

Merkta vøran verður ein serlig vøra, ið hevur ein eyka kvalitet, sum vanligu standardvørurnar ikki hava. T.v.s, at merking veitir møguleika fyri at differentiera vøruna frá øðrum líknandi vørum. Hetta vil bøta um langtíðar kappingarførið og harvið menna føroysku fiskivinnuna og samfelagið búskaparliga. Liðugtvøran kann verða seld á vistfrøðiligum (økologiskum) matvørumarknaðum, har prísirnir vanliga eru 20-50 % hægri. Á hesum marknaðum er fiskur enn ein mangulvøra, serliga tí at útboðið av merktum fiskavørum er sera avmarkað. T.v.s, at kappingin er lítil og møguleikar eru fyri hægri vinningi enn vanligt. Í teimum førum, har tann merkta fiskavøran ikki fær ein meirprís, hevur hon framvegis tann fyrimunin, at nógvir brúkarar taka hana framum aðrar fiskavørur. T.v.s., at tær merktu

fiskavørurnar so smátt verða við yvirlutan í kappingini við vanligar fiskavørur og sum nevnt, verður hetta serliga galdandi í tí ríka partinum av heiminum, har fiskaprísirnir eru hægstir.

Ein annar kappingarfyrimunur sum merkingin hevur við sær, er, at vøran fær sporføri. Hetta kemst av, at fyri at framleiðsluhátturin kann verða eftirmettur og góðkendur, er neyðugt at hava fult skjalfest sporføri av grunni at munni. Sporføri kann koma tilgóðar í marknaðarføring og 'branding' av vøruni. Við sporføri kunnu skjalfestar upplýsingar og søgur knýtast at vøruni. Skjalfestar upplýsingar, sum kundin hevur áhuga í og søgur, sum geva brúkaranum ein uppliving við at keypa vøruna, kunnu væntandi veita vøruni eitt størri søluvirði. Harumframt verður sporføri í fiskivinnuni eitt lógarkrav frá 1. januar 2005.[31]

# 4 Møguleikar í Føroyum

Møguleikar og áhugi í føroysku vinnuni fyri merking av fiskavørum er sum nevnt ein av týðandi fortreytunum fyri, at arbeiðið kann verða sett í verk.

## 4.1 Egnað fiskasløg

Við møguleikar í Føroyum verður serliga hugsað um egnað fiskasløg. Fyrsti stóri spurningurin í hesum sambandi er, um grundarlag skal verða tikið í føroysku fiskidagaskipanini ella í ICES tilmælunum. Um tilmælini frá ICES og Fiskirannsóknarstovuni verða nýtt, er støðan sera einføld, tí sambært teimum er veiðitrýstið á nærum øllum fiskasløgum undir Føroyum ov stórt.

Tó eru møguleikar fyri, at veiða eftir staðbundnum skeljadjórum undir Føroyum, kann fáa eitt vistfrøðiligt merki. Harumframt eru felagsstovnarnir fyri norðhavssild, makrel og lodnu mettir at vera egnaðir at fáa eitt umhvørvismerki. Søguliga sæð tykist toskastovnurin á Føroyabanka eisini vera skynsamt umsitin, men skjalatilfar manglar enn. Tá ið skjalatilfar er fingið til vega, eru møguleikar fyri at toskurin á Føroyabanka kann fáa eitt vistfrøðiligt, burðardygt ella umhvørvisvinarligt merki.

## 4.2 Áhugi í vinnuni

Sum heild hevur stórur áhugi verið vístur fyri hesi fyrireikandi verkætlan. Tað sum serligur dentur verður lagdur á, eru møguleikarnir fyri at fáa ein hægri prís fyri vøruna. Tann lutfalsliga lítli íløgutørvurin til merkingin av fiskavørum er eisini ein orsøk til áhugan.

Viðvíkjandi pelagiskum fiskasløgum hevur verið tosað við reiðarar á nótabátum og aðrar framleiðarar, ið eru áhugaðir í at samarbeiða um verkætlanina. Partvís fígging frá vinnuni er fingin til vega fyri at staðfesta, um nevndu pelagisku fiskasløgini kunnu fáa eitt umhvørvismerki.

# 5 Tilmæli

Grundarlagið fyri at seta merking av fiskavørum í verk í Føroyum verður mett at vera gott. Egnað merki finnast, marknaðurin tykist áhugaverdur og bæði møguleikar og áhugi er í føroysku vinnuni. Tí verða mælt til at halda fram við hesum arbeiði á tríggjar ymsar hættir.

## 5.1 Stuðla vistfrøðiligari merking

Á vistfrøðiliga matvørumarknaðinum er týdningarmiklasta keypsorsøkin sum nevnt matvørutrygd og merkini, ið tryggja matvørutrygd eru tað vistfrøðiliga og tað burðardygga merkið, men ikki umhvørvismerkið. Tí verður mælt til fyrst at royna at fáa vistfrøðiliga góðkenning fyri føroyskar fiskavørur har til ber. Mælt verður til at framleiðarar, ið nýta skeljadjór sum rávøru, verða upplýstir um hesar vinnumøguleikar og stuðlaðir í at gera neyðugu fyrireikingarnar til at seta merking í verk. Eisini verður mælt til at fáa skjalatilfar til vega um toskin á Føroyabanka fyri at staðfesta, um veruligt grundarlag er fyri at fáa eitt vistfrøðiligt merki.

## 5.2 Menna burðardygt merki

Marknaðarútlitini fyri burðardyggum fiskavørum vera mett at vera góð, men einki burðardygt merki finst (sambært allýsing á bls. 6). Tí verður mælt til aktiva luttøku í arbeiðinum at gera ein stovn, ið kann veita eitt burðardygt merki fyri fiskavørur. Norðurlandaráðið er ein upplagdur møguleiki, ið eigur at verða royndur fyrst.

## 5.3 Seta umhvørvismerking í verk

Inntil eitt burðardygt merki finst (væntandi um fleiri ár) verður mælt til at fáa MSC-umhvørvismerkið fyri tann føroyska fiskiskapin, ið er egnaður til hetta. Atfinningarnar móti MSC-stovninum vera ikki mettar at vera nóg góð orsøk til at steðga arbeiðinum. MSC-merkið er eitt stig á leiðini til at fáa burðardygga merkið, tá ið tað verður klárt. Mælt verður til at grunnurin 'Fiskivinnuroyndir' stuðlar verkætlan hesum viðvíkjandi.

# 6 Notur

Noturnar vísa til skrivligu keldurnar, ið hava verið nýttar. Allar keldurnar síggjast á hjálagdari fløgu og mælt verður til at hyggja inn á fløguna um serligur áhugi er fyri ávísum evnum.

[1] Uppkast til føroyska ætlan um burðardygga menning Ár 2002 - 2020.pdf
[2] http://www.un.org/esa/sustdev/documents/agenda21/english/agenda21toc.htm
[3] World Summit On Sustainable Development (WSSD).pdf
[4] The Johannesburg Declaration on Sustainable Development.doc
[5] The Conference Declaration.doc
[6] The State of World Fisheries and Aquaculture - Part 1.pdf (Blaðsíða 22).
[7] The State of World Fisheries and Aquaculture - Part 4.pdf (Blaðsíða 5).
[8] Rio Declaration on Environment and Development.doc
[9] IFOAM Basic Standards 2002.pdf
[10] Eitt annað merki, ið kann nevnast er 'Friend of the Sea'. Sí: www.friendofthesea.org
[11] MSC facing crisis of credibility, internal reports conclude.doc
[12] MSC Principles and Criteria for Sustainable Fishing.doc
[13] MSC Certification Methodology.doc
[14] MSC-fisheries - June 2003.doc
[15] An Arrangement for the Voluntary Certification of Products of Sustainable Fishing.pdf
[16] KRAV project description – eco-labelling of wild capture fish and shellfish.pdf
[17] KRAV Standards for eco-labelling - Second draft.pdf
[18] The Marketplace for Sustainable Seafood.pdf
[19] Seafood Labelling Trends.pdf
[20] Is Organic Healthier - The Science Supporting Organic Foods.pps
[21] Hábitos de Consumo y Medio Ambiente en España 2001.pdf
[22] Gundað á: Hamm, Ulrich; Gronefeld, Friederike and Halpin, Darren: "Analysis of the European market for organic food", 2002, The University of Wales, Aberystwyth, Bretland.
[23] The World of Organic Agriculture 2003 – Statistics and Future Prospects.pdf (Blaðsíða 24).
[24] Organic Food in Japan - Industry Profile.pdf
[25] Overview World Markets for Organic Food & Beverages (forecast).pdf
[26] Organic foods in Spain 2003 - Martin Joensen.pdf
[27] Gundað á: 1) Hamm, Ulrich; Gronefeld, Friederike and Halpin, Darren: "Analysis of the European market for organic food", 2002, The University of Wales, Aberystwyth, Bretland. 2) Minetti, Ana Clara: "Marketing de alimentos ecológicos", 2002, Ediciones Pirámide (Grupo Anaya S.A.), Madrid, Spania. 3) Organic foods in Spain 2003 - Martin Joensen.pdf
[28] ITALY - TWO THIRDS OF SCHOOL CATERERS USING ORGANIC FOOD.doc
[29] UK - INDEPENDENT SCHOOLS PROVIDING HEALTHIER TUCK.doc
[30] ORGANIC FOODS IN CATERING – THE NORDIC PERSPECTIVE.pdf
[31] Article 18 of the regulation (EEC). Nr. 178/2002 (BasisVO)